# Prógvhandan á Vinnu-háskúlanum

**Fríggjadagin 19. juni fingu 30 menn og tvær kvinnur prógv handað á Vinnuháskúlanum**



**Skiparar:** Antenes M. Joensen, Andreas Jacobsen, Davis Dalbø, Ditlev Winther, Ernst Súni Ennigarð, Fríðrik Sivertsen, Albjørg Joensen, Helgi Luid Solmunde, Høgni B. Rasmussen, Jan Vestergaard, Jógvan Joensen, Johan K. Jacobsen, Kári L. Dahl Christiansen, Martin S. I. Joensen, Pál Eirikur Vang, Pætur Niels Holm, Snæbjørn Berg og Súni Gaard



*Myndir: PhotoCare*

**Skipsførarar:** Durita Christophersen, Sofus K. Joensen og Mourits Danberg. Á myndini er bert Mourits Danberg. Hini bæði vóru longu farin í vinnu, tá prógvuni vóru handað.



**Maskinmeistarar:** Ellindur Grástein, Hans Jørgin Nicolajsen, Oystein Jensen, Poul Dan Kjærbo, Pætur Klein Jacobsen, Ragnar Slættanes, Símin í Heimustovu, Ingi Weihe, Johan Berg og Magni Flagstad Berg

www.us.fo

## Nýtt Landsfólkayvirlit

Umhvørvisstovan bjóðar vinnufyritøkum til kunnandi fund týsdagin 30. Juni um nýggju Landsfólkayvirlitsskipanina

Endamálið er at LFY skal vera ein miðsavnaðnandi skrá, sum inniheldur persónupplýsingar, sum kunnu brúkast av almennum - og privatum stovnum og virkjum, og á tann hátt vera við til at persónupplýsingar í øðrum skipanum eru rættar og eftirfarandi. Skipanin hevur støði í løgtingslóg nr. 41 frá 8.mai 2007 um fólkayvirlit.

Upplýsingarnar í LFY skulu vera lætt atkomiligar hjá øðrum og uttan tekniskar forðingar ("åbne standarder") og byggja á SOA-konseptið.

Virkir sum hava førleika at menna ta nýggja landsfólkayvirlitsskipanina verða biðin um at møta á fundi á Umhvørvisstovuni týsdagin 30. Juni kl. 10.00.

Á fundinum verður tilfar um skipanina gjøgnumgingið og útflýggjað.

Tilboð um gerð av skipanini skal ætlandi verða Umhvørvisstovuni í hendi innan 30.september 2009.

Miðjað verður ímóti, at skipanin kann royndarkoyrast á vári 2010 og setast í verk miðskeiðis 2010.

sansir.fo

umhvørvisstovan

*Umhvørvisstovan er ein nýskipaður stovnur, sum fyrisitur lendismál, tinglýsing, fólkaskráir, náttúru- og umhvørvisvernd.*